UTTAN ÚR HEIMI

# USA kann leypa á Irak longu fyri jól

**Um stutta tíð hava amerikanarar savnað so nógvar hermenn og herútgerð við Persaflógvan, at teir kunnu leypa á Irak longu fyri jól. Samstundis krevur politiska andstøðan í USA, at Bush skal leggja fram prógv fyri, at Irak hevur hópoyðingarvápn.**



*Amerikanskir stríðsvognar í oyðimørkini í Kuwait klárir at søkja at Irak*

*Mynd: Reuters*

IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen*

Samstundis sum irakar hava latið ST eitt yvirlit yvir landsins vápnagoymslur, er amerikanska verjumálaráðið í ferð við at leggja teir seinastu liðirnar í ætlanini at leypa á Irak.

Í dag hevur USA umleið 60.000 hermenn og 200 flogfør á leiðunum við Persaflógvan umframt fleiri herskip, og sunnudagin segði ein talsmaður hjá verjumálaráðnum, at USA er skjótt ført fyri at seta eitt álop á Irak í verk.

Í Kuwait hava amerikanarar 9.000 hermenn, og har eru eisini 24 amerikansk herskip við teimum tiltiknu Apache-tyrlunum. Hvønn dag koma bæði hermenn og útgerð til Kuwait.

Fýra amerikanskir flogberar eru í økinum til reiðar at senda flogfør at leypa á mál í Irak. Ein fimti flogberi, sum hevur hildið til í Landssynningsasia, hevur nú fingið boð um at seta kós ímóti Persaflógvanum. Á flogvallum í Kuwait, Saudiarabia, Oman, Turkalandi og á oynni Diego Garcia í Indiska Havinum standa amerikansk bumbuflogfør til reiðar at fara á flog.

Amerikanskir talsmenn hava sagt, at USA er væl fyrireikað til at leypa á sunnaneftir, men at støðan er ein onnur norðanfyri. Tí hava fleiri amerikanskir sendimenn verið í Turkalandi seinastu dagarnar fyri at fáa myndugleikarnar har at loyva amerikanskum flogførum at nýta turkiskar flogvallir til álop á Irak. Higartil hevur Turkaland svarað, at USA sleppur at nýta landsins flogvallir, treytað av at ST-trygdarráðið góðkennir eitt amerikanskt álop á Irak. Hinvegin hava turkar sagt, at teir vilja ikki loyva USA at senda hermenn hagar.

Í gjár fóru amerikanskir og bretskir hermenn undir eina stóra venjing í Qatar. Ovasti fyri venjingini er amerikanski generalurin Tommy R. Franks, sum eisini var ovasti fyri amerikansku hermonnunum í Afghanistan. Hann skal nú leiða eitt møguligt álop á Irak.

### Krevja prógv

Samstundis sum Pentagon leggur seinastu hond á ætlanina at leypa á Irak, krevur demokratiska andstøðan í USA, at George W. Bush, forseti skal leggja fram prógv fyri, at Irak hevur hópoyðingarvápn. Higartil hevur forsetin bert sagt, at Irak hevur slík vápn.

- Tað er neyðugt at fáa prógvini fram, serliga um Saddam Hussein framvegis heldur uppá, at Irak eingi hópoyðingarvápn hevur, sigur demokratiski leiðarin í kongressini, Tom Daschle. Hann heldur, at tær iraksku upplýsingarnar, sum ST hevur fingið, mugu kannast væl og virðiliga, og at vápnaeftirlitsmenninir hjá ST mugu sleppa at gera sítt arbeiði liðugt, áðrenn nøkur avgerð um álop verður tikin.

Fyrrverandi varaforsetin Al Gore segði við sjónvarpið ABC, at eftir hansara tykki hevur amerikanska stjórnin tey neyðugu prógvini, men hann ivast kortini í, um tað er rætt at leypa á. Aðrar loysnir eiga at verða royndar fyrst, heldur Al Gore.


KOM OG GER KVETTIÐ

Vit selja brúktbilar við stórum avsláttri

| Nr.Pláta | Bilaslag | Litur | Árgang | KM | Prísur Fyrr | Prísur Nú |
|---|---|---|---|---|---|---|
| SA009 | Ford Mondeo 1.8TD stw | Bláur | aug.95 | 170.000 | 114.000 | 70.000 |
| BN757 | Ford Escort 1.8i 5H clx | Svartur | april.96 | 106.000 | 74.000 | 60.000 |
| EK078 | Mitshubitshi Galant 2.0 TD | Hvítur | 1995 | 236.000 | 69.000 | 49.000 |
| | Opel Vectra 1.7 TD | | 1996 | 170.000 | 65.000 | 89.000 |
| F51852 | Ford Mondeo 1.8i 5 H | Svartur | juni.95 | 78.000 | 69.900 | 60.000 |
| NG891 | Citroen Xantia 1.8 TD 5H | myrkagrønur | 1996 | 117.000 | 98.000 | 68.000 |
| F51339 | Ford Escort 1.8 Diesel | Svartur | 1995 | 219.000 | 65.000 | 52.000 |
| BT904 | Mondeo 1.8i Flair 4h. | Violet | 1997 | 63.000 | 103.000 | 90.000 |
| F52480 | Escort 1,8CLX diesel | Vínreyður | 1995 | 164.000 | 66.400 | 52.000 |
| TF411 | Ford Mondeo 1.8i | ljóst lilla | 1997 | 66.000 | 122.550 | 100.000 |
| EJ149 | Ford Escort 1.8 Diesel | grønur | 1996 | 154.000 | 73.500 | 55.000 |
| F51864 | Ford Escort 1.6i 5 H | myrkagrønur | 1995 | 81.000 | 61.000 | 51.000 |
| AP054 | Ford Escort 1.3i clx | Vínreyður | 1997 | 80.000 | 65.100 | 50.000 |
| FA991 | Ford Transit 2.5 Diesel | Vínreyður | 1996 | 102.000 | 100.000 | 85.000 |
| GA790 | Ford Escort | Bláur | 1996 | 133.000 | 77.000 | 55.000 |
| TJ380 | Ford Escort 1.8 Diesel | lilla | 1997 | 83.000 | 92.400 | 70.000 |
| F5976 | Ford Escort 1.8i stw | lilla | 1996 | 76.000 | 69.000 | 55.000 |
| F87518 | Ford Scorpio | Bláur | | | 10.000 | 8.000 |
| AK691 | Kia Carneval 2.9 Tdi 7pers | ljósa brúnt | 2001 | 90.000 | 198.000 | 158.000 |
| SD557 | Opel Vectra 2.0i | Bláur | 1996 | 93.000 | 115.000 | 96.000 |
| F52238 | Ford Escort 1.8 diesel | grønur | 1995 | 111.000 | 67.000 | 52.000 |
| TV446 | Ford Escort 1.8 TD | Vínreyður | 1997 | 137.000 | 90.000 | 70.000 |
| MA597 | Ford Escort 1.6i clx | Silvur | 1999 | 27.000 | 109.000 | 100.000 |
| SJ230 | Ford Focus 1.6i Ghia | Bláur | 1999 | 48.000 | 146.000 | 134.000 |
| RU789 | Ford Fiesta 1.8 Diesel | myrkareyður | 1995 | 169.000 | 55.000 | 44.000 |
| FN616 | Suzuki Baleno 1.3i | grønur | 1997 | 84.000 | 82.000 | 65.000 |
| YK139 | Opel Vectra 1.7 TD | grønur | 1996 | 170.000 | 89.000 | 65.000 |
| JA078 | Ford Mondeo 2.0 TD | gráur | 2001 | | 215.000 | 200.000 |
| VS120 | Ford Mondeo 1.8 TD stw | Silvur | 2000 | 96.000 | 150.000 | 120.000 |
| F51543 | Ford Escort 1.8 Diesel | Silvur | 1995 | 171.000 | 65.000 | 50.000 |




P/f Wenzel
Akranesgøta 5 · Tlf. 354500
Boks 3043 · 110 Tórshavn · www.wenzel.fo




UTTAN ÚR HEIMI

## Kanna konto

Ísraelska løgreglan hevur sett sær fyri at kanna viðurskiftini hjá einum handilsmanni, sum verður lagdur undir at hava umsitið eina loyniliga konto hjá Yasser Arafat í einum banka í Sveits.

Sambært ísraelsmonnum hevur handilsmaðurin, sum eitur Yossi Ginosar, flutt pengar av kontoini hjá Arafat til eina ella aðra loyniliga konto. Ísraelski ríkisákærin sigur, at talan er um ovurstórar upphæddir - tilsamans einar 2,2 milliardir krónur.

Yossi Ginossar, sum hevur verið ráðgevi hjá Arafat, hevur sagt við ísraelska sjónvarpið, at hann hevur einki at fjala. Hann sigur, at pengarnir eru farnir til mong ymisk endamál, eitt nú samskiftisskipanir í teimum palestinsku sjálvsstýrisøkjunum.

## Heldur ikki hesaferð

Heldur ikki hesaferð eydnaðist tað at velja forseta í Serbia.

Serbiska vallógin krevur, at minst 50 prosent av veljarunum skulu atkvøða, fyri at valið kann fáa gildi. Tá serbar vóru á vali fyri fimm vikum síðani, var valluttøkan ov lítil, og á umvalinum um vikuskiftið kom hon heldur ikki upp á 50 prosent. Bert smá 45 prosent atvkøddu.

Virkandi forsetin, Vojislav Kostunica, fekk sum væntað flestar atkvøður, og hann krevur nú, at umval skal haldast eina ferð afturat. Kostunica vil vera við, at tann serbiska stjórnin hevði falsað umleið 400.000 nøvn á veljaralistunum, og at valið um vikuskiftið tí ikki var lógligt. Sambært serbisku grundlógini skal ein fyribilsforseti tilnevnast, og so skal umval haldast innan 60 dagar.

## Nýggj grøn leiðsla

Tey Grønu í Týsklandi valdu um vikuskiftið nýggjan formann og næstformann, sjálvt um ein stórur meiriluti av flokslimunum vóru ímóti at velja nýggja leiðslu. Tey vildu fegin varðveita formannin, Claudiu Roth, og næstformannin, Fritz Kuhn, sum fáa æruna av tí sera góða úrslitinum, sum flokkurin fekk á valinum í september.

Men tey bæði kundu ikki halda fram. Tann 22. september vórðu bæði vald í samveldistingið, og tá reglurnar hjá flokkinum siga, at formaðurin og næstformaðurin ikki skulu sita í samveldistinginum ella stjórnini, mátti flokkurin fáa nýggja leiðslu. Eftir langt orðaskifti valdu limirnir ta 45 ára gomlu Angeliku Beer og tann 49 ára gamla Reinhard Butikofer.

Fremsti politikarin hjá Teimum Grønu, uttanríkisráðharrin Joschka Fischer, var fyri at broyta reglurnar, so Roth og Kuhn kundu halda fram, men hann fekk ikki ta neyðugu undirtøkuna fyri at broyta reglurnar.

## Nýggjur ráðharri

Í USA hevur George W. Bush, forseti tilnevnt John R. Snow nýggjan fíggjarmálaráðharra. Hann tekur við eftir Paul O'Neil, sum varð koyrdur frá seinasta fríggjadag.

Tann 63 ára gamli John R. Snow hevur seinastu árini verið stjóri í flutningsfyritøkuni CSX, sum er tann størsta av sínum slagi har eysturi í USA. Hann er útbúgvin búskaparfrøðingur og løgfrøðingur og hevur doktaraheiti í búskapi. Undir Gerald Ford, forseta arbeiddi John R. Snow í flutningsmálaráðnum.

Áðrenn tann nýggi fíggjarmálaráðharrin kann taka við, skal senatið góðkenna hann, og eygleiðarar siga, at hann kann vænta sær nógvar spurningar um møguligt samband millum CSX og stjórnarumsitingina í Washington.

# Eingin ísur í Arktis um hundrað ár

**Kanningar hjá amerikanska rúmdarstovninum NASA vísa, at ísurin í Arktis minkar nógv skjótari enn higartil hildið**

UMHVØRVI
*Árni Joensen*

Ein nýggj frágreiðing hjá NASA vísir, at ísurin í Arktis minkar nógv skjótari, enn vísindafólk hava hildið.

Amerikansku kanningarnar vísa, at frá 1978 til 2000 minkaði ísøkið 1,2 millión ferkilometrar. Tað merkir, at ísurin minkaði níggju prosent í hvørjum tíggju ára skeiði.

- Heldur hetta fram, fer ísurin í Arktis at hvørva, áðrenn hendan øldin er av, sigur Josefino Comiso, granskari í NASA. Sum er sæst broytingin best í økjunum norðan fyri Kanada og Alaska, sigur hon.

So hvørt sum ísurin hvørvur, ger Pólhavið heitari og heitari. Tað kemst av, at ísurin sendir sólstrálurnar frá sær, meðan havið tekur meiri av hitanum í seg.

Hvørvur ísurin, fer tað at fáa stórar avleiðingar fyri vistfrøðina í tí arktiska økinum. Ein onnur avleiðing kann verða, at jarðarhitin fer at veksa skjótari enn nú.


...nýtið bussin!



Lít teg um, meðan Bygdaleiðir koyra teg vestur. Síggj Skælingsskarð í Streymoy og ver løtu seinni bergtikin av Breiðastíggi vígamegin. Og unnir tú eisini umhvørvinum okkurt, er busstúrurin bara ein ókeypis og sómeinandi síðuvinningur, sum Bygdaleiðir bjóða.

Alt hetta fært tú, meðan strongdir bilførarar í tíðarneyð hvør í sínum lagi skifta gír og síðu, spita upp og blinda niður, viska og venda sær og fkoyta og froysa. Meðan tú bara ert burtur í onkrum.

Tú ert nevniliga vaknaður og vorðin varugur við, at tað at ferðast skal kennast sum ein frægd frá fyrstu frítíð. Og samstundis, sum tú fært frið at fara, verður tú borin millum bygda á stórum og tryggum hjólum. Eisini úr oyggj í oyggj undir sundi.

Kostnaðurin er hin sami sum áður, hóast tænastan er vorðin nógv betri. Leiðin er munandi stytt, og frameftir fer nýtt starvsfólk at hjálpa ferðandi við viðførinum.

Hví baksast í bili? Nýtið bussin!

BYGDALEIÐIR
STRANDFARASKIP LANDSINS
www.ssl.fo · 34 30 30